# Málsviðgeri til ALS

ALS lýsir við hesum eftir málsviðgera til Tryggingar- & ávísingardeildina

**Starvið:**
Uppgávurnar hjá málsviðgeranum eru í høvuðsheitum:

- málsviðgerð/samrøður í sambandi við førleikagevandi tiltøk
- málsviðgerð í sambandi við arbeiðsávísing og farloyvisskipanina
- samskifti millum ALS og arbeiðsgevarar
- at vera við til at tillaga og menna arbeiðið innan arbeiðsávísing og førleikagevandi tiltøk

Málsviðgerin verður settur á Tryggingar- & ávísingardeildini, har 12 fólk starvast.

Umframt arbeiðsávísing, farloyvisskipan og førleikagevandi tiltøk umsitur Tryggingar- & ávísingardeildin eisini NordJobb, vanligan arbeiðsloysisstuðul, fiskavirkisskipanina, flyting millum A-kassar og arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi.

**Førleiki:**
Talan er um eitt avbjóðandi starv, har tú mást:

- hava hóskandi útbúgving
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- hava góð samstarvsevni
- kunna arbeiða í bólki, har lyklaorðini eru fleksibilitetur og dynamikkur
- kunna arbeiða við EDV á brúkarastøði

Fyrimunur er, um tú hevur arbeiðsroyndir innan fyrisiting og innlit í føroyska arbeiðsmarknaðin.

**Vit bjóða:**
Eitt starv við nógvum ymiskum uppgávum, har tú bæði arbeiðir sjálvstøðugt og í tøttum samstarvi við onnur.

Góðir møguleikar eru fyri skeiðluttøku og eftirútbúgving.

Løn sambært avtalu. Miðað verður eftir, at starvið verður sett sum skjótast.

**Umsókn:**
Umsóknir, við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera ALS í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. mars 2001 kl. 12.00. Umsóknir skulu sendast til:

**ALS**
**Postsmoga 3022**
**110 Tórshavn**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til deildarleiðaran, Anne á Dalbø, á teldupostadressu anne@als.fo ella á tel. 349550.

*ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 21 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.*

ALS
Arbeiðsloysisskipanin
P.O.Box 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551
teldupostur: als@als.fo



TK Stovan

**Tiltøk fyri vinnuna**

**Vitja www.tk.fo, har yvirlit er yvir tiltøk í Føroyum ætlað vinnuni, t.d. kunningarfundir, skeið, framsýningar v.m.**

Til ber øllum at leggja tiltøk ókeypis inn á síðuna, og eisini at melda seg til einstøku tiltøkini.

**31 73 66**
**www.tk.fo**

**TK Stovan**
Niels Finsensgøta 37
FO-100 Tórshavn
**Fax** 319363
**www**.tk.fot
**E-mail** tk@tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3138
**Navn:** Sp/f Christiansen
**Adressa:** 530 Fuglafjørður
**Kommuna:** Fuglafjarðar Kommuna
**Stovningardato:** 03.03.2001
**Viðtøkudato:** 03.03.2001
**Kapitalur:** Kr. 110.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 110.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Jón Leif Christiansen, 530 Fuglafjørður.
**Stjórn:** Jón Leif Christiansen, 530 Fuglafjørður.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** : P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 03.03.2001 - 31.12.2001
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka fiskivinnu, keyp, søla og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 20. marts 2001

Kristin Balle


**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*



# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Honda Civic 1.4 IS - 5 gear, 4 hurðar
**Árg.:** 1996
**KM:** 61.254

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú, og kann síggjast á Tryggingini á Smyrilsvegi í Tórshavn.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Fróði Müller, sýnsmaður
tlf. 345727
e-mail: fm@trygging.fo
fax nr. 345607
at hitta mánadag–hósdag millum kl. 08⁰⁰–10⁰⁰ og fríggjadag kl. 08⁰⁰–16⁰⁰



# Bilur við stórum frontskaða til sølu

**Merki:** Toyota Corolla 2.0 XL STW. Diesel
**Árg.:** 1995

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú og kann síggjast hjá Tryggingini á Smyrilsvegi í Tórshavn.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Beinleiðis tlf. 345727
fax nr. 345607
Fróði Müller
e-mail: fm@trygging.fo
at hitta mánadag–hósdag millum kl. 08⁰⁰–10⁰⁰ og fríggjadag kl. 08⁰⁰–16⁰⁰



Sosialurin

Lesið Sosialin - tað loysir seg



zarepta

*Um Gud vil verður bíbliugransking í Zarepta á páskum*

**Evnir:**
Móses
Rómbrævið 9–16
Tessalonikabrævið
Líðingarvika Jesusar

**Tíð:**
Skeiðið byrjar mikukvøldið 11.4.2001 og endar mánadagin 16.04.2001

Aldursmark 17 ár og eldri

**Tilmelding:**
Áhugað verða biðin um at tekna seg í góðari tíð á tlf. 315062




ÚT AT KOYRA

# Koyriteknisk breyt hevur stóran týdning fyri ferðslutrygdina

**Orsøkin til óhappið var hálka, verður ofta sagt eftir at eitt ferðsluóhapp er hent, har vegurin var hálur. Spurningurin er um orsøkin var hálka, ella manglandi førleiki hjá bilføraranum til at handfara eina hættisliga støðu. Øll, sum koyra bil í hálku, áttu at ásanna, at tað koma løtur, tá tey høvdu ynskt at havt meiri vitan um hálkukoyring**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Ásannandi hendan veruleika hava grannnalond okkara lógarfesta koyrifrálæru á koyritekniskum breytum, sum m.a. hava hálkuvenjingar sum part av hesi frálæru. Raksturin av hesum breytum verður skipaður á ymiskan hátt, tó ikki sum almenn ogn.

Her hjá okkum eru ikki góðar umstøður til frálæra um koyring í hálku, men fleiri ferðir verður skipað fyri túrum við ferðaløgum til Noregs og Danmarkar á hálkuskeið. Seinnu árini hevur Strandfaraskip Landsins skipað fyri hesum ferðum. Fleiri av teimum, sum hava hildið seg vera dugnalig í ferðsluni, hava fingið annað at síggja, tá tey læra hvussu tingini veruliga hanga saman. Felags fyri tey flestu, sum hava verið til hesi hálkuskeið er, at tað eru fólk sum hava koyring sum sítt arbeiði, so sum koyrilærarar, lastbila- og bussførarar, og frá ymiskum flutningsfyritøkum.

## Góð frálæra

Tað, sum ein lærir á slíkum skeiðum er til dømis, at tað ber ikki til at bremsa og stýra samstundis. Eisini hevur ferðin stóran týdning, tí um vit koyra millum keylurnar á hálkubreytini við t.d. 40 km/t, klára vit væl at koyra uttan at raka keylurnar, men seta við ferðina upp við bert 5 km/t, til 45 km/t, kann hetta føra til at allar keylurnar verða koyrdar niður. Eisini verður lært, hvussu vit sleppa avstað í mótbrekku í hálku, eins og hvussu man skal fyrihalda seg í undanbrekku. Umframt hetta verður eisini lært nógv tekniskt um bilar og økonomikoyring, har tað eru pengar at spara, um koyrt verður við umhugsni.



*Landsbyggifelagið gjørdi hetta modellið av koyritekniskku breytini, sum skuldi byggjast í Havnardali*

## Koyriteknisk breyt í Havnardali

Sjálvandi er alt hetta sera gott, men vanligi bileigarin hevur ikki nógvar møguleikar at ogna sær hendan kunnleika. Tað er sera spell, tí hetta kundi forðað fyri nógvum óneyðugum samanstoytum og ferðsluvanlukkum. Ikki tí, fyri nøkrum árum síðan var alt klárt til at gera eina koyriteknkiska breyt í Føroyum. Ein arbeiðsbólkur við umboðum frá Bileftirlitinum, Landsarkitektinum, Landsverkfrøðinginum, Landsbyggifelagnum, Tryggingarsambandinum og koyrilærarunum skrivaðu eitt álit um breytina sum ein sjálvsognarstovn, og hvussu raksturin skuldi skipast. Pengar vóru játtaðir og grundstykkið var klárt úti í Havnardali. Landsbyggifelagið gjørdi eitt modell, sum varð alment sýnt fram. Eisini vóru umboð frá N.A.F. í Noreg her sum ráðgevar, og søgdu frá teirra royndum við hálkubreytum.

## Vónandi ikki slept

Men av einari ella aðrari orsøk bleiv hendan ætlan ongantíð sett í verk. Ein orsøk skuldi vera, at larmur frá hálkubreytini kundi ørkymla hestarnar hjá Ríðingarfelagnum, sum helt til í grannalagnum í Havnardali.

Ætlanin var at koyriteknkiska breytin skuldi vera ein sjálvsognarstovnur, har øll, sum gingu til koyrifrálæru, skuldu læra at koyra í hálku, áðrenn tey fingu koyrikortið. Eisini kundi verið skipað fyri kappingum, har kappast varð millum stovnar, fyritøkur og einstaklingar, um hvør bleiv »ársins úrvalsbilførari«.

Vónandi er hendan verkætlan ikki slept, tí ein koyriteknisk breyt hevði havt ómetaliga stóran týdning fyri ferðslutrygdina í tí alsamt vaksandi ferðsluni í landi okkara.




*Bert ferðin veksur við 5 km/t kann verða trupult at koyra millum keylurnar*



*Bussur á veg oman eftir hálkubreytini*